# Avrikslisti á Fólkatingi 2015 - 2019

JAVNAÐARFLOKKURIN

# Eitt sindur um virksemið Javnaðarfloksins á Fólkatingi valskeiðið 2015-2019

**Álitisstørv**

Formaður í Føroyanevndini 2011-2017

Formaður í Arktiska Arbeiðsbólkinum 2015-

Limur í Brexit-fylgibólkinum hjá Fólkatinginum 2017-

Varalimur í Norðurlandaráðnum 2011-

Varalimur í Uttanríkispolitisku nevndini 2011-

Limur í eftirlitsnevndini hjá Norðurlendska Íløgubankanum 2016-

Atgongd til allar nevndir eftir tørvi gjøgnum samstarv við danska javnaðarflokkin.

## Fíggjarlógir

**2016:**

2 mió. kr. til FarGen

3,6 mió. kr. til endurgjald til føroyingar (og grønlendingar), sum í 2012 av órøttum mistu rættin til ávísar sosialar veitingar.

Fongsulsviðurskifti og føroysk politistøð vórðu umrødd undir samráðingunum í 2016. Tað gav ikki úrslit tá, men hevur havt týdning seinni.

**2017:**

3 mió. kr. til Gamla Hospital

2,5 mió. kr. til Føroyahúsið í Keypmannahavn.

**2018:**

3 mió. kr. til FarGen

**2019:**

9,5 mió. kr. til Mentanarhús í Klaksvík

2 mió. kr. til Gamla Hospital

# Markaforðingar

### NemID/CPR

Arbeitt hevur verið miðvíst við at loysa teir trupulleikar, sum kunnu standast av, at nógvir føroyingar ikki hava CPR-nummar ella NemID.

Fleiri ábøtur eru gjørdar. Millum annað er heimildin at skriva út umsitingarligt CPR-nummar nógv víðkað, so bæði SU-styrelsen, Ríkissjúkrahúsið og Ríkispolitiið kunnu gera hetta.

Ein endalig teknisk loysn liggur nú eisini klár, sum ger tað møguligt at bíleggja og fáa CPR-nr. og NemID umvegis eina skrivstovu í Føroyum. Forarbeiðið er gjørt av Javnaðarflokkinum á Fólkatingi og donsku stjórnini við stuðli frá løgmanni. Uppskotið bleiv lagt fyri landsstýriskvinnuna í innlendismálum, men hon valdi ikki at fara víðari við málinum.

### Samstarv við Føroysku Sendistovuna og Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark

Regluligir fundir hava verið á Christiansborg um m.a. hvussu vit beina burtur markaforðingar og hjálpa føroyingum, sum so ella so koma tvørt fyri í skipanini.

### Sosialar veitingar til føroyingar í Danmark

Í valskeiðinum 2011-2015 var sonevnda “optjenings-princippet” sett í verk. Hetta var eitt krav um, at ein persónur skuldi hava búð í Danmark í eitt áramál áðrenn hann kundi fáa ávísar sosialar veitingar - t.d. at ansa egnum børnum við hús. Føroyingar, sum fluttu til Danmarkar, skuldu tí bíða í sjey ár, áðrenn teir kundu fáa sama rætt sum danir.

Hetta fingu vit broytt soleiðis, at bústaður í Føroyum telur við, og føroyingar eru tí ikki fyri mismuni longur.

Tað tekur tíð og áhaldni at skapa úrslit: Málið varð tikið upp við stjórnina í 2015 og varð avgreitt við lógarbroyting í 2018. Vit sleptu ikki málinum, og tað gav úrslit. Føroyingar, sum høvdu verið fyri vanbýti, fingu enntá sínar veitingar við afturvirkandi kraft.

### Vegleiðing til lógaruppskot

Eftir at vit hava eftirlýst tað ferð eftir ferð, hevur danska løgmálaráðið nú dagført sína vegleiðing um lógaruppskot fyri at fyribyrgja, at nýggjar markaforðingar koma fyri. Nú skal altíð kannast, hvørjar avleiðingar eitt uppskot kann hava fyri Føroyar og føroyingar.

### Persónsmál

Vit hava fingið sera nógvar fyrispurningar um hjálp og vegleiðing frá fólki, ofta tí tey so ella so eru komin tvørt fyri í skipanini. Vit hava vegleitt so væl vit kunnu – ofta í samráð við Rágevingina fyri førroyingar í Danmark. Tá fyrispurningarnir hava verið av prinsipiellum slag, hava vit eisini tikið teir upp sum politisk mál á Fólkatingi.

# Politisk mál

### Uttanríkis- og verjupolitikkur

Vit hava øll árini stuðlað ynskinum um, at Føroyar mugu kunnu tala sína egnu søk í altjóða høpi. Stjórnin hevur nú viðurkent trupulleikan og veruligar royndir verða nú gjørdar at loysa málið. Tað vísir hetta brotið úr røðuni hjá Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra, í sambandi við at Fólkatingið varð sett 2. oktober 2018: "Både Færøerne og Grønland ønsker større indsigt og inddragelse i udenrigs- og sikkerhedspolitikken. Det stiller nye krav til den måde, vi samarbejder på i rigsfællesskabet. Det er et tema, som regeringen ser frem til at drøfte mere indgående med Færøerne og Grønland i den kommende tid."

Í óteljandi røðum, greinum og samrøðum við pressuna hava vit víst á, at danska grundlógin ikki longur er karmur um ríkisfelagsskapin. Vit hava nógv víðari ræsur enn tað, grundlógin loyvir - og soleiðis skal tað vera. Ríkisfelagsskapurin er - og skal vera - ein politiskur felagsskapur. Hann skal ikki vera eitt juridiskt búr.

Kortini tvíheldur danska embætisverkið ofta um júst hetta. Tað hava vit samanborið við alternativ fakta. Tað er so øgiliga nógv, ið er ímóti grundlógini, men sum kortini hevur víst seg at bera til. Tí eiga vit framvegis at krevja størri ávirkan á egin uttanríkisviðurskifti, hóast grundlógarinnar bókstavur ikki loyvir tí.

### Hernaðarmál

Vit hava støðugt víst á, at tað er neyðugt og týdningarmikið, at Føroyar verða tiknar við í tilgongdina, tá ið danska ríkið fer í kríggj. Tað er trupult at fáa stjórnina at lova nakað, men tess oftari, vit taka tað upp, tess meira forstáilsi er fyri sjónarmiðinum – bæði hjá stjórnini og sum heild millum danskar politkarar.

Vit hava eisini aftur og aftur víst á, at ein avtala millum Danmark og Føroyar frá 2005 - Fámjinsskjalið - verður brotin, um Føroyar verða hildnar uttan fyri avgerandi partar av uttanríkis- og verjupolitikkinum.

### Stjórnarskipan Føroya

Vit hava áhaldandi grundgivið fyri, at føroyingar mugu kunnu samtykkja sína egnu stjórnarskipan. Stjórnin hevur sagt nei - men tá hon fekk seinasta uppskotið til hoyringar, segði hon ja. Vit loyva okkum at halda, at okkara áhaldandi arbeiði hevur gjørt mun.

Eftir vantar bert, at semja verður gjørd í politisku skipanini í Føroyum, og at málið verður latið føroyingum at taka støðu til á fólkaatkvøðu.

### Handil við Russland

Á Fólkatingi hava vit nýtt hvørt høvi at vísa á, hví ongin andsøgn er ímillum at selja fisk til Russlands og samstundis vera partur av Vesturheiminum.

Ongin ráðharri í stjórnini hevur talað ímóti hesum, men tað hava fleiri týðandi politikarar gjørt, og tað hevur pressan eisini gjørt. Tí hava vit við góðum grundgevingum vart samhandil okkara við Russland, samstundis sum eingin ivi er sáddur um, at vit eru eitt vestanland og eitt NATO-land.

### Føroyskir fangar í Føroyum og Danmark

Í samráð við starvsfólk í arrestini í Mjørkadali hava vit talað fyri, at umstøðurnar í fyrsta lagi verða bøttar, og í øðrum lagi at eitt nýtt fongsul verður bygt í Føroyum. Hetta er gjørt mótvegis viðkomandi ráðharrum, forsætisráðharranum og í orðaskiftum á Fólkatingi.

Hetta hevur havt við sær, at munagóðar ábøtur eru gjørdar í Mjørkadali – men tað hevur ikki eydnast at fáa pengar settar av til eitt veruligt fongsul í Føroyum.

Vit hava eisini virkað fyri, at bøtt verður um umstøðurnar hjá føroyskum langtíðarfangum, sum sita í Danmark.

### Politistøð

Í 2016 var støðan tann, at danskir myndugleikar tvey ár frammanundan høvdu givið tilsøgn um at keypa gamla bygningin hjá Bank Nordik í Havn. Keypið dróg út, og bygningurin fekk alsamt størri skaða av at standa óbrúktur. Tí strongdu vit í 2016 á stjórnina fyri at avgreiða keypið av gamla Bank Nordik, sum Tórshavnar Kommuna í tvey ár hevði bíðað eftir. Hetta eydnaðist.

Vit tóku aftur málið upp við danskar myndugleikar, tá ið fleiri fólk tætt at projektinum sáddu iva um, hvørt bygningurin var egnaður. Hesar atfinningar høvdu ikki verið førdar fram áður.

Vit settu okkum so í samband við føroyskar fyritøkur og íleggjarar, og í samstarvi við løgmann royndu vit at vísa á aðrar, betri loysnir.

Stjórnin var positiv, og vit høvdu fleiri fundir um málið. Men tá til stykkis kom, vildi hon ikki broyta sína ætlan.

Tá so verkætlanin at gera gamla bankabygningin til politistøð fór í gongd, hættaðu føroyskar fyritøkur sær ikki undir at bjóða uppá ararbeiðið, tí ES-útboðsreglur vórðu nýttar.

Vit fara at virka fyri, at stjórnin frameftir bjóðar út eftir føroyskum reglum.

### Veteranar

Føroyskir krígsveteranar hava havt munandi verri kor enn teirra donsku felagar, og fleiri teirra hava vent sær til okkum við ynskjum um broytingar. Vit hava tikið málið upp við stjórnina og danskar veteranmiðsstøðir – og fleiri ábøtur eru nú gjørdar. Donsku tænasturnar til veteranar eru víðkaðar til eisini at fevna um Føroyar, hátíðarhald fyri veteranar hava verið í Føroyum, og tilfar um møguleikar, tilboð og annað er nú eisini á føroyskum.

## Undirvísing um Føroyar

Vit hava øll árini virkað fyri, at vitan um Føroyar og føroyingar gerst størri millum danir – og serliga donsk skúlabørn. Hetta er gjørt gjøgnum kanningar, spurningar til ráðharrar, við at taka tað upp í fólkatingstingsalinum og við at hava fundir við viðkomandi partar.

Eitt beinleiðis úrslit er, at undirvísing um Føroyar um stutta tíð verður fastur táttur í donskum skúlum.

Eitt annað ítøkiligt úrslit er, at undirvísingartilfar um Føroyar er gjørt til danskar lærarar.

Vit hava sjálv verið við til at gera okkurt av hesum tilfari – og vit hava víst á skeivleikar í øðrum tilfari, sum er gjørt. Hesir skeivleikar eru síðani rættaðir.

## Fosturtøka

Vit hava brúkt nógva tíð og orku uppá at lýsa hetta trupla, eyma, men týðandi málið í sambandi við, at tað bleiv yvirtikið á sumri 2018. Vit hava lýst málið frá øllum síðum, tosað við kvinnur, sum hava fingið fosturtøku og skipað fyri almennum tiltaki um hetta.

## Norðurlandaráðið

Norðurlond standa sterkast saman. Norðurlandaráðið hevur ein stóran leiklut í hesum. Tí luttaka vit í arbeiðinum.

Vit ført fram føroysku sjónarmiðini um, hví Føroyar skulu hava sjávstøðugan limaskap, og stjórnin sigur seg nú vilja virka aktivt fyri, at støða Føroya kann styrkjast í norðurlendska samstarvinum.

## Arktis og shipping

Øll árini hava vit luttikið á nógvum ráðstevnum, kjakfundum o.a. um Arktis. Vit nýta altíð høvið at vísa á, at Arktis ikki skal vera eitt reservat, men eitt stað har fólk kunnu liva og mennast.

Føroyar liggja væl fyri í mun til nýggju siglingarleiðirnar, sum væntandi verða kring Arktis. Hetta gevur møguleikar fyri shipping-virksemi, og vit hava frá byrjan, í samstarvi við føroyskt vinnulív, nýtt fólkatingssessin til at marknaðarføra Føroyar á ráðstevnum og heilt ítøkiliga við at gera eina heimasíðu um føroyskar maritimar tænastur. Somuleiðis hava vit skipað fyri tiltøkum við shipping sum høvuðsevni.

# Ymisk mál

### Áhugi frá Novo Nordisk-grunninum

Vit settu fólk at kanna møguleikan fyri, at útlendskir íleggjarar kundu seta pengar í FarGen og føroyska heilsugransking.

Eftir at fleiri partar høvdu arbeitt saman, var fundur á heysti 2018 við Novo Nordisk Grunnin, sum tá hevði verið í Føroyum við tilboð um, at Føroyar - eins og fimm regiónir í Danmark og Grønland - kundu fáa munandi íløgur í diabetesviðgerð og -fyribyrging.

Tað vísti seg, at grunnurin var sinnaður til eisini at hyggja nærri at eini kombineraðari ílegu- og heilsukanning í Føroyum - FarGen Health - og seta heilt munandi upphæddir í hesa verkætlan.

Samskiftið um hetta helt tíverri uppat, tá samskifti millum føroyskar myndugleikar og grunnin um diabetes-miðstøðina steðgaði. Vit loyvdu okkum at tala at handfaringini hjá landsstýriskvinnuni av hesum máli, men vóna framvegis, at málið kann koma á beint og fáa eina reiðiliga og sakliga viðgerð.

### Føroyar nýtt Google-land

Føroyar eru ikki eitt land í skipanini hjá Google, og er t.d. trupult at keypa appir til android-telefonir í Føroyum.

Vit hava í samráð við fleiri partar tikið hetta upp, og stutt áðrenn valið bleiv skrivað út fingu vit tey boð frá Google-Danmark, at Føroyar stóðu ovast á listanum yvir lond, sum skulu gerast partur av skipanini.

### Lóggávumál

Vit hava – í góðum samstarvi við landsstýrið – strongt á fyri at fáa stjórninina at ráðfesta lóggávu, sum hevur við Føroyar at gera, hægri. At ein partur av ríkinum – Danmark – er í ES meðan Føroyar eru uttanfyri, er ikki altíð so einfalt. Og tað krevur, at ein alla tíðina er á varðhaldi til tess at forða fyri, at føroyingar óætlað koma undir lógir, sum eru ætlaðar ES-borgarum og øðrum útlendingum.

### Rættarfyrivarni

Danska rættarfyrivarni varð í 2015 sent til fólkaatkvøðu. Í tí sambandi vístu vit millum annað á demokratiska trupulleikan í, at atkvøtt ikki varð um hetta í Føroyum. Orsøkin var, at Danmark var um at senda felags málsøki til Bruxelles uttan at føroyingar høvdu nakran møguleika at taka støðu til málið.

### Føroysk hernaðartænasta

Uppskot kom í Fólkatingið um at áleggja føroyingum tvungna hernaðatænastu. Hetta hóast Føroyar ikki hava ávirkan á danskan trygdar- og verjupolitikk. Vit talaðu harðliga ímóti hesum, og uppskotið varð eisini felt.

## Føroyskir yvirmenn í Grønlandi

Fólkatingssessurin kann brúkast til annað enn at tosa til politisku skipanina í Danmark. Millum annað heittu vit á Grønland um at umhugsa eitt uppskot av nýggjum, sum hevði borið í sær, at nógvir føroyskir yvirmenn á grønlendskum skipum høvdu mist kjansin og hýruna. Okkara sjónarmið – upprunaliga førd fram á Fólkatingi - blivu nógv endurgivin í Grønlendskum miðlum. Uppskotið bleiv ikki framt.

## Hjúnarbandslógin

Hjúnarbandslógin kom fyri í Fólkatinginum í februar 2017. Tað var eingin ivi um Løgtingsins vilja – men av tí, at hetta var danskt málsøkið, skuldu danskir myndugleikar avgreiða tað endaliga. Teknisk sæð var uppskotið, sum Løgtingið samtykti, ikki heilt eftir bókini. Tí vóru vit á fundi við danska ráðharran um málið og hjálptu við at fáa formalitetirnar uppá pláss.

## Vitapassarahús

Fleiri felagsskapir innan mentanarøkið heittu á okkum at skunda undir ætlanirnar at geva teimum nýtslurætt til vitapassarahúsini í Mykinesi.

Á tveimum fundum við danskar ráðharrar løgdu vit fram tær visioneru ætlanirnar við húsunum, sum høvdu stuðul frá nógvum pørtum – eisini føroyska Mentamálaráðnum. Ætlanirnar blivu væl móttiknar av donsku stjórnini, og tað var góð gongd í málinum. Men alt steðgaði, tá landsstýrið boðaði frá, at alt hetta málsøkið skuldi yvirtakast. Eftir yvirtøkuna er hetta jú ikki eitt mál fyri danskar myndugleikar.

Men yvirtøkan bleiv tíverri av ongum, og tí hendi einki í málinum. Men fyrireikingarnar eru gjørdar, og vil eitt komandi Landsstýrið yvirtaka økið, fara vit at stuðla tí. Um ikki, fara vit at taka ætlanirnar hjá mentanarfelagsskapunum upp aftur.

## “Flagg-gate” 29. juli 2016

Forsætisráðharrin gjørdi á vári 2016 av, at danskir stovnar og myndugleikar skuldu flagga við Merkinum ólavsøkudag.

Á hátíðarhaldi í tí sambandi, har allir ovastu leiðararnir vóru til staðar, søgdu vit okkara meining um, hvør týdningurin av hesum skuldi vera – nevniliga at ríkisfelagsskapurin støðugt skal flyta seg móti at gerast ein felagsskapur av javnsettum londum.

Vit grundgóvu fyri, hví danska grundlógin IKKI longur er karmur um felagsskapin, og at grundlógin tí ikki skal nýtast til at steðga føroyskari menning, hvørki tá tað snýr seg um uttanríkispolitikk ella føroyska stjórnarskipan.

Vit søgdu eisini, at vitanin um Føroyar er alt ov lítil millum danir – og tað bleiv so dyggiliga prógvað, tá flaggað bleiv fyrstu ferð, og litirnir í Merkinum vóru skeivt samansettir.

Hetta átalaðu vit harðliga – men tóku tað eisini sum dømi um, at vitanin og áhugin fyri Føroyum skal styrkjast. Og júst hetta hevur helst – óbeinleiðis – slóðað fyri, at 25 mió. blivu settar av til upplýsing um ríkisfelagsskapin í desember 2018, eins og undirvísing um Føroyar verður partur av pensum í fólkaskúlanum.

**MVG av talgildum tænastum**

Føroyingar keypa alsamt fleiri talgildar nettænastur til stroyming av tónleiki, filmum og spølum, so sum Netflix, Spotify, Viaplay, Playstation o.l. Meirvirðisgjaldið av hesum tænastum fer tó ikki í føroyska landskassan, men í danska statskassan.

Tann upphædd, føroyingar koyra í danska statskassan á hendan hátt, verður størri og størri, sum árini ganga. Hetta hava vit víst á, og vit hava boðið okkum at samstarva við føroyskar myndugleikar um at fáa tað broytt. Men áhugin fyri at gera nakað við tað hevur ikki verið nóg stórur.

Vit arbeiða víðari við hesum, og royna at fáa í lag samstarv um at fáa tað broytt. Føroyskt meirvirðisgjald skal sjálvsagt í landskassan.

## Útgávur

| | | |
|---|---|---|
| **Eitt stað uttan familju er bara eitt stað** | Maj | 2019 |
| **Brexit: Avleiðingar fyri Føroyska Fiskivinnu** | Februar | 2018 |
| **Fosturtøka í Føroyum: Lóggávan, hugburðir og kjakið** | August | 2017 |

## Tiltøk, ferðir og fundir

### 2019

| | |
|---|---|
| Framløga og kjak um kanning: “Eitt stað uttan familju er bara eitt stað” | Maj |
| Kjakfundur: “Bora ella ei” | April |
| Tiltak um Shipping og Maritimar Tænastur í Løkshøll | Januar |

### 2018

| | |
|---|---|
| Fólksins: Fyrilestur “Um Trump var Løgmaður Føroya” | Oktober |
| Arctic Circle: Framløgur um Shipping og vinnulív í Føroyum og Arktis | Oktober |
| Plastik Planurin: Stórt tiltak um plastik og dálking í NLH | Oktober |
| Mentanarnátt á Christiansborg | Oktober |
| Folkemødet Bornholm: Við í kjakum um Ríkisfelagsskapin, Arktis og dálking | Juni |
| Arctic Circle Forum: Framløgur um Shipping og Maritimar Tænastur | Mai |
| Brexit: Upplegg um Brexit og fiskivinnu hjá Eysturoyar Vinnufelag | Apríl |

### 2017

| | |
|---|---|
| Upplegg um Brexit og fiskivinnu á ráðstevnu í Fólkatinginum | December |
| Fundir í Helsinki við Arktiska arbeiðsbólkinum | November |
| Upplegg á Christiansborg fyri donskum prestum | November |
| Mentanarnátt á Christiansborg | Oktober |

| | |
|---|---|
| Arctic Circle: Stór sessión um Ferðavinnu | Oktober |
| Luttøka á ST-aðalfundi í New York umboðandi Fólkatingið | September |
| Fosturtøka: Kjakfundur og framløga av kanningini Fosturtøka í Føroyum | August |
| Islam: Stórt kjak tiltak um Islam | Mai |
| Vertir á ráðstevnu um burðardygga nýtslu af havsins tilfeingi | Mai |
| Framløga fyri Frit Forum um hvussu Brexit kann ávirka Ríkisfelagsskapin | April |
| Vitjan av Mette Frederiksen í Føroyum | Mars |
| Vitjan í Katalonia saman við øðrum fólkatingslimum | Mars |

## 2016

---

Vitjan í Írlandi, Norður-Írlandi og Bruxelles við Brexit fylgibólkinum

Ráðstevna: Yvirtøka av útlendingamálum

Hoyring um genetik á Christiansborg (Færøudvalget)

Ráðstevna um yvirtøku av útlendingamálum á Christiansborg (Færøudvalget)

Luttøka í panelkjaki á Norður Atlantsbryggjuni um Ríkisfelagskapin

Umboð fyri Fólkatingið við framløgu á Arctic Economic Development Forum í Washington

Startup Føroyar ráðstevna á Christiansborg í samstarvi við Íverksetarahúsið

Luttøka í hoyring í UPN um at Føroyar eru ov lítið við í donskum uttanríkispolitikki

Vitjan hjá Føroyingafeløgum í Århus, Aalborg og Odense

"Politikkur so tú skilur hann" – ókeypis kvøldskeið fyri ung folk

Luttøka á ráðstevnu í Russlandi fyri parlamentslimum í Arktisku regiónini (SCPAR)
Í Ulan-Ude norðanfyri Mongolia við parlamentarikarum úr arktisku londunum

Fleiri fundir við veteranar og myndugleikar um teirra viðurskifti

Fyriskipan av vitjan hjá Føroyanevndini saman við ríkisumboðnum

Ferð við Udenrigspolitisk Nævn (UPN) í Iran

Høvuðsrøða á temafundi um uppboðssølu av fiskirættindum hjá íslendska javnaðarflokkinum

## 2015

---

Ráðstevnur um framtíðina innan føroyska fiskivinnu í Østrøm og á Christiansborg

Hoyring um grindadráp á Christiansborg (Færøudvalget)

Ráðstevna: Nye erhvervsmuligheder i nordatlanten

Almennur fundur í Østrøm har týskarin Christian Rebhan legði fram sína serritgerð um Føroyar og ES

Altjóða eygleiðari á lokalvalinum í Catalonia

Fundur og framløgur í Østrøm um verkætlanina Faroe Islands Maritime Services

Luttóku á Arctic Economic Development Forum í Washington

Arctic Circle, Reykjavík: vit samskipaðu stórt føroyskt átak um orku og shipping